## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Lot til andøvsgul av útnyrðingi, seinnapartin minni vindur. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 3 og 6 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Fleyr til gul av útnyrðingi ella av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Fleyr til gul av útnyrðingi ella av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 7 og 10 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Fleyr til gul av vestri og eitt skifti møguliga regn, annars mjørkaflókar. Hitin millum 8 og 12 stig.

# Gott veður á norðoyastevnu

**Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, roknar við góðveðri á norðoyastevnu. Vindurin verður lítil, og møguleiki er fyri sól**

STEVNUVEÐUR
*Eyðun Klakstein*

Líkt er til, at norðoyastevnuveðrið fer at verða gott. Seinastu vikuna hevur veðrið ikki verið nakað serligt norðanfyri, men líkt er til, at vikuskiftið fer at roynast betri.

– Fríggjdagin verður nakað av vindi, men út á dagin minkar vindurin. Leygardagin verður lítið av vindi, og møguleiki er fyri, at sólin kemur fram. Hitin verður helst millum 5 og 8 hitastig, men hitin kann kanska koma upp í 10 stig, sigur veðurfrøðingurin Petur Skeel Jacobsen, sum dagliga greiðir lesarum hjá Sosialinum frá veðrinum.

– Sunnunáttina og sunnudagin verður eisini lítið av vindi, so tað er líkt til, at norðoyastevnuveðrið verður gott, sigur hann.

Veðrið hevur avgerandi ávirkan á, hvussu summarstevnurnar kring landið eydnast, og ársins fyrsta stóra stevna verður eftir øllum at døma vælsignað við góðveðri.



*Veðurfrøðingurin á Sosialinum roknar við góðum veðrið á norðoyastevnu*

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 4 |
| Nuuk | 4 |
| Qaqortoq | 5 |
| Ammassalik | 9 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 7 |
| Seyðisfjørður | 1 |
| Tórshavn | 5 |
| Lerwick | 10 |
| Aberdeen | 10 |
| London | 18 |
| Tromsø | 10 |
| Bergen | 9 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 17 |
| Keypmannah. | 15 |
| Helsinki | 17 |
| Moskva | 17 |
| Berlin | 18 |
| Warzawa | 16 |
| Kiev | 16 |
| Bukarest | 22 |
| Paris | 19 |
| Madrid | 25 |
| Róm | 22 |
| Malorca | 24 |
| Athen | 25 |
| Malta | 25 |
| Tunis | 35 |
| Beijing | 29 |
| New Dehli | 28 |
| Bangkok | 28 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 19 |
| New York | 23 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | 23 |
| Panama | 30 |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 17 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 996 hPa. yvir Norðsjónum fer norðureftir.




Lágtrýstið við Vestur-Noreg grynnist og ein veikur hátrýstryggur norðan fyri Ísland verður væntandi yvir Føroyum um vikuskiftið.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 06/06 kl. 06[00]–07/06 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 5,8°
Minsti hiti máldur í juni 0,0° Mesti hiti máldur í juni: 20,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 2,3 mm – mált frá 06/06 kl. 06[00]–07/06 kl. 06[00]
Avfallið higartil í juni: 13,9 mm






## VESTFALLSKYRRINDI

6. juni: Fullmáni
11. juni: Mánin longst frá jørðini
14. juni: Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2001

| Dagur | Suðuroyar—/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar—/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna—sundi fp. | sp. | Mykines—firði fp. | sp. | Nólsoyar—firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar—/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna—sundi fp. | sp. | Fugloyar—firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 8. juni | 09.24 | 21.49 | 08.24 | 20.49 | 08.39 | 21.04 | 11.24 | 23.49 | — | 12.24 | 07.39 | 20.04 | 06.39 | 19.04 | 09.39 | 22.04 | 10.39 | 23.04 | 09.09 | 21.34 | 10.24 | 22.49 |
| 9. juni | 10.13 | 22.36 | 09.13 | 21.36 | 09.28 | 21.51 | — | 12.13 | 00.49 | 13.13 | 08.28 | 20.51 | 07.28 | 19.51 | 10.28 | 22.51 | 11.28 | 23.51 | 09.58 | 22.21 | 11.13 | 23.36 |
| 10. juni | 11.00 | 23.22 | 10.00 | 22.22 | 10.15 | 22.37 | 00.36 | 13.00 | 01.36 | 14.00 | 09.15 | 21.37 | 08.15 | 20.37 | 11.15 | 23.37 | — | 12.15 | 10.45 | 23.07 | — | 12.00 |

www.sosialurin.fo